**Edmund Joensen**
**løgtingsmaður** **Nr. 53/2018**

**Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a**

**Fyrispurningur um staðfesta tapi hjá Landsbankanum, settur landsstýrismanninum í fíggjarmálum, Kristinu Háfoss (at svara skrivliga eftir TS § 52a)**

1. Hvussu stórt var staðfesta tapið hjá Landsbankanum í samband við tað, sum kallaðist “tryggar íløgur” hjá Eik Banka?
2. Hví seldi Landsbankin krav sítt víðari fyri umleið 17% úr búnum?

**Viðmerkingar:**

Tíðindi ganga um, at í samband við bankakrakkið hjá Eik Banka, so vórðu sokallaðar "tryggar íløgur", sum endaðu hjá Lehman Brothers, og sum Landsbankin fyrst keypti og so seldi aftur fyri lágan prís.

Aðrir føroyingar í somu støðu fingu sama tilboð, men hildu, at tá ið spekulantar bjóðaðu uppá krøvini, so var tað tí, at búgvið var meira vert.

Tað hevur eftir øllum at døma verið røtt meting. Upplýst verður, at higartil hava teir fingið umleið 60% aftur úr búnum og fáa støðugt útgoldið pening.

Tað er sera týdningarmikið fyri tingmenn at vita, hvussu Landsbankin umsitur fólksins skattapening.

Tí verða hesir spurningar settir landstýrismanninum.

**Á Løgtingi, 21. februar 2019**

Edmund Joensen